# SAS-partabrøv í fríum falli

**Við einum virðistapi upp á 67% hetta seinasta árið, fær flogfelagið SAS eina keðiliga topp-staðseting á listanum yvir flogfeløg í Evropa, ið hava mist mest marknaðarvirði**

FLOGVINNA
*Finnur Sivertsen,*
*búskaparfrøðingur*
*Business-line*
*bs@post.olivant.fo*
*www.bl.fo*




*Mats Jansson, forstjóri í SAS: - Tað er ov stórt gap millum tað, vit hava megnað, og tað, vit settu okkum fyri. Hetta er eitt keðiligt tekin um, at vit ikki evna at taka rættar avgerðir og ikki gerða neyðugar broytingar rættstundis*

Ikki allar topp-staðsetingar eru av tí góða. Tað má stóra norðurlendska flogfelagið SAS ásanna, eftir at felagið nú liggur ovast á listanum yvir flogfeløg, ið hava mist mest marknaðarvirði hesar seinastu 12 mánaðirnar.

Felags norðurlendska flogfelagið hevur mist 67% av sínum marknaðarvirði hetta seinasta árið, og samlaða virðið á felagnum liggur nú niðanfyri sjey milliardir kr., vísir ein nýggj uppgerð.

## Ikki bara SAS

Eisini onnur flogfeløg hava mist meira enn 60% av sínum virði, herundir stóra bretska flogfelagið British Airways og lágprísflogfelagið Easyjet. Somuleiðis hava risastóru flogfeløgini Air France/KLM og týska Lufthansa mist ávikavist helmingin og fimtingin av sínum marknaðarvirði hetta seinasta árið.

## Undantakið Norwegian

Bara norska lágprísflogfelagið Norwegian hevur megnað at økja sítt marknaðarvirði í eini tíð, tá útlit eru til niðurgongd í heimsbúskapinum, og methøgir oljuprísir senda flogfeløgini út í ein kollektivan niðurtúr.

## SAS kundi ikki innfría sínar spariætlanir

At tað júst er SAS sum liggur ovast á tapslistanum, eru tað sambært serfrøðingum fleiri orsøkir til, umframt tær, ið hava rakt alla flogvinnuna.

- Fyri tað fyrsta var kursurin á SAS partabrøvunum í so høgt ásettur fyri einum ári síðani, tí vónir vóru um, at kunngjørda strategi- og spariætlanin hjá leiðsluni kundi givið felagnum hækkandi inntøkur.

Men síðani hevur leiðslan hjá SAS viðgingið, at hon ikki hevur megnað at gjøgnumføra spariætlaninar sum vónað, men bert spart 25% móti teimum 33% sum áður mett. Hetta hevur gjørt íleggjarar ótryggar, sigur Brian Børsting, partabrævagreinari hjá LD Markets.

Hann vísir á, at SAS teir fyrstu mánaðirnar í árinum hevur havt eina lækking í flogferðaprísum millum 5 og 8% samstundis sum útreiðslur til brennievni støðugt hækka munandi.

Og tá ein príslækking upp á eitt prosentstig gevur eina inntøkuminking upp á 300 mió kr., so er hetta sum eiturevni hjá einum felag, ið hevur ætlanir um at fleirfalda inntøkurnar innan 2011.

## Dash kostar cash

Ein trupulleiki kemur sjáldan einsamallur. SAS hevur seinasta árið havt ikki havt færri enn trý álvarslig óhapp við sínum sonevndu Dash-flogførunum, ið seinni er tikin úr rakstri. Hetta hevur sett síni djúpu spor í felagið og bert gjørt trongu støðuna hjá SAS uppaftur verri, sigur Brian Børsting, partabrævaserfrøðingur.

*Óhappini við sokallaðu Dash-flogførum í somu viku í fjør heyst settu hvøkk í ferðafólk hjá SAS*

